# Rógvi hevur endurvunnið plássið

**Við triðja sigrinum á rað er KR sloppið undan niðurflytingar hóttanini, og nú stríðast teir fyri at sleppa upp í part í altjóða kappingum næsta ár**

ÍSLAND
*Jóannes Hansen*

Sunnudagin vann KR fyri triðju ferð á rað. Teir spældu á Laugardalsvøllinum móti Þrótti, sum er í ógvuliga stórum niðurflytingarvanda. KR vann 1-0. Málið fingu teir tveir minuttir eftir steðgin. Tað skoraði miðvallarin Dalibor Pauletic. Hetta var fjórði dysturin hjá honum á KR liðnum, og hetta var fyrsta ferðin, at hann taldist millum málskjúttarnar. Málverjin hálvbjargaði, og miðvallarin var fyrstur á returbóltinum.

Rógvi Jacobsen hevur tær seinastu ferðirnar ikki verið millum teir fyrstu ellivu á KR liðnum. Tað var hann hesa ferð. Rógvi var annar av álopsspælarunum í 4-4-2 uppstilling. Rógvi hevði í 9. minutti góðan stútara eftir hornaspark, men tað eydnaðist honum ikki at fáa mál.

Tað eru bara nakrar vikur síðani, at KR taldist millum liðini, sum stríddust fyri at sleppa undan niðurflytingar hóttanini. Eftir tríggjar sigrar á rað er KR ikki longur í vanda fyri at flyta niður. Teir eru nú nummar fýra, og tað ber møguleika við sær fyri at spæla Intertoto næsta ár.

Meistararnir av Hafnafirði taptu fyri fyrstu ferð í hesum kappingarárinum, tá ið teir í sekstanda umfarinum vóru á Akranesi. ÍA, sum er nummar trý, vann 2-1 á meistaraliðnum, sum hevði fleiri millum teir fyrstu ellivu, sum ikki hava spælt nakað serligt fyrr í ár.

Grindavík vann 3-1 á heimavølli móti Fram. Símun Samuelsen og Keflavík skulu ikki í eldin fyrr enn í kvøld, tá ið teir skulu spæla á útivølli móti Fylkir.

# Jón Rói er ivasamur

**Atli Gregersen er nú partur av Skjold, sum er størsta felagið í Danmark, og sum er á aftasta sessinum í næstbestu donsku deildini**



*Jón Rói Jacobsen var ikki førur fyri at spæla við liðnum hjá Frem, sum um vikuskiftið spældi javnleik móti Vejle*

DANMARK 1. DEILD
*Jóannes Hansen*

Tað hilnaðist einki serligt í vikuskiftinum hjá føroysku feløgunum í næstbestu donsku deildini. Fyrstu umførini gekk tað sum eftir ánni hjá Fremad Amager, sum undan vikuskiftinum var oddalið. Tann sessin mistu teir, tá ið tað ikki eydnast at fáa meiri enn eitt stig burturúr, tá ið Køge vitjaði. Úrslitið var 2-2, eftir at einki mál var komið í 1. hálvleiki.

Fremad Amager var á odda bæði 1-0 og 2-1. Andrew av Fløtum var millum teir fyrstu ellivu, men hann taldist ikki hesa ferð millum málskjúttarnar. Andrew hevði í 1. hálvleiki onkran góðan møguleika at gera mál. Hann varð skiftur út, tá ið tað restaðu níggju minuttir, og tá ið støðan var vorðin 2-2.

Frem spældi 1-1 á heimavølli móti Vejle. Mitt í viku hittust somu feløg í steypakappingini, og tá vann Frem 2-1. Ta ferðina noyddist Jón Rói Jacobsen at fara av vøllinum orsaka av liðbandsskaði í fótliðnum. Jón Rói var ikki førur fyri at spæla sunnudagin. Gunnar Nielsen og Jónas Þór Næs sótu á Frem beinkinum allar 90 minuttirnar. Einasta føroyska íslettið, um tað í hesum førinum ber til at siga tað soleiðis, var Ulrik Balling, sum fyri trimum árum síðani spældi við NSÍ.

Niðurflytararnir í Randers eru oddalið. Hesa ferð høvdu teir vitjan av Lyngby, sum hevði Christian Lamhauge Holst á liðnum. Randers vann 4-1. Christian var á vøllinum inntil tað restaðu trettan minuttir.

Nýggjur føroyingur í næstbestu donsku deildini er Atli Gregersen, sum inntil fyri fáum vikum síðani var fastur maður í GÍ miðverjuni. Skjold hoyrir til á Eysturbrúgv í Keypmannahavn. Felagið er størsta fótbóltsfelagið í Danmark, tá ið roknað verður í limatali.

Besta Skjold liðið hevur ongantíð verið í fremstu deildini. Tað eru bara nøkur fá ár síðani, at felagið eftir fleiri uppflytingar, rakk upp í næstfremstu deildina. Har stendur í løtuni einki serligt til. Skjold er aftast. Higartil hava teir ikki vunnið í hesum kappingarárinum, og sunnudagin løgdu teir rygg til 2-0 tap í Gladsaxse móti AB.

# Altjóða luttøkan kostar í heimligu kappingini

**AGF smurdi troytta Brøndby av, og føroyska luttøkan var lítil, tá ið Horsens enn eina ferð megnaði málleysan javnleik**

SUPERLIGAN
*Jóannes Hansen*

Tað kostar ofta í heimligu kappingini, tá ið teir felag luttekur í europeisku kappingunum. Sunnudagin sást enn eitt prógv um hetta, tá ið danska meistaraliðið, Brøndby, var í Århus. AGF hevði inntil sunnudagin staðið seg sera illa, og teir vóru niðastir á støðutalvuni, meðan Brøndby var oddalið. Men tað sást ikki á avrikunum. AGF vann 3-0, og Brøndby varð spælt niður og norður.

Brøndby venjarin, Michael Laudrup, staðfesti, at spælararnir hjá honum vóru troyttir, og tað gjørdi støðuna uppaftur verri, at tríggir lyklaspælarar noyddust av vøllinum, tí teir vóru skaddir. Talan var um liðformannin og landsliðsspælaran Per Nielsen, vongverjan Thomas Rytter og gávuríka Mads Jørgensen. Brøndy skal í UEFA Cup spæla móti FC Zürich, og um tað eydnast at vinna móti teimum, skal Brøndby luttaka í bólkaspælinum. Tað kann fara at vísa seg at verða kostnaðarmikið í heimligu kappingini, heldur Brøndby venjarin.

Hetta var fyrsta Brøndby tapið í landskappingini síðani 19. mai.

Í FC Midtjylland vóru teir ikki troyttari enn so av Føroya ferðini, at teir megnaðu at vinna 4-2 í Haderslev móti SønderjyskE. Fyri FCM verjuspælaran, Jesper Mikkelsen, var talan um rættuliga minnisverdan sunnudag. Hann plagar ikki at teljast millum málskjúttarnar, men tað gjørdi hann so sanniliga hesa ferð. Hann gjørdi sjálvmál, tá ið heimaliðið legði seg á odda 2-1. Frammanundan hevði hann skorað við framúr frísparki, og so skoraði hann tvær ferðir upp á brotsspark!

FCK tykist vera væl fyri, og nú eru teir einsamallir á odda í superliguni. Hesa ferð vunnu teir 2-0 í Parkini móti Silkeborg. Eftir innlegg frá Peter Møller, sum hóskvøldið hevði skorað bæði málini, tá ið FCK vann 2-0 í Wales í UEFA Cup, varð Santos feldur, tá ið tað restaðu sjey minuttir av fyrra umfarinum. Vongverjin Lars Jacobsen sendi brotssparkið dygst upp undir samankomingina, og tríggjar minuttir eftir steðgin skoraði nýggi landsliðsspælarin og miðverjin Michael Gravgaard, sum FCK í summar keypti úr Viborg.

Bæði tey føroysku feløgini - Horsens og AaB - eru í tyngra endanum. Hesa ferð hittust feløgini hjá Johan B. Hansen og Súna Olsen í Horsens. Úrslitið var málleysur javnleikur. Hetta var triðja ferðin á rað, at Horsens var partur av 0-0 uppgerð, og eftir sjey umfør er málmunurin hjá teimum 1-7. Teir hava framvegis ikki skorað á heimavølli.

Føroyski leikluturin var ikki stórur. Johan B. Hansen var als ikki á vøllinum, og Súni Olsen varð skiftur inn, tá ið tað restaðu sjey minuttir.

Esbjerg liggur eisini tungt í sjónum. Hóskvøldið vórðu teir sendir úr UEFA Cup í Tromsø, og sunnudagin taptu teir 2-0 í Farum. Í sjey teimum fyrstu umførunum hevur tað bara eydnast Esbjerg at vinna eina ferð, og teir hava tapt fýra ferðir. Harafturat ljóðar, at tveir av lyklaspælarunum - Jan Kristiansen og Frederik Berglund - skulu vera á veg burtur úr felagnum.

Hjá Viborg gekk sum eftir ánni fyrstu umførini. Sunnudagin taptu teir 2-1 á heimavølli móti OB, og harvið hava teir tapt tvær ferðir á rað.

# Hatta var dýrt

NSÍ-venjarin ásannaði, at talan var um dýran stigamiss hjá hansara monnum, nú tað ikki eydnaðist at basa TB um vikuskiftið.

- Tað er tað. Nú høvdu vit vunnið okkum í eina sera góða støðu við trimum heimasigrum á rað, og tí var vónin sjálvandi, at vit skuldu taka seinasta fetið upp móti oddinum. Tað eydnaðist so ikki, og vit mugu so bara rætta tankarnar fram móti næstu uppgávuni, tá vit skulu taka móti EB/-Streymi. Tann uppgávan verður í sjálvum sær ríkiliga stór, helt Trygvi.

Spurdur um dystin, helt Trygvi, at tað serstakliga hevði kostað teimum, at teir ikki vóru meira effektivir framman fyri málinum.

- Vit hava allar møguleikar at avgera dystin. Ikki minst, tá tað er 4-3 til okkum, og vit tvær ferðir eru púrasta leysir við málverjanum, men stórbjargar skotinum frá Páll, og í hinum førinum er Kári ikki nóg kaldur, staðfestir venjarin.

Men hartil, so fekk Trygvi illa krógvað, at hann helt lítið um dómaraavrikið í dystinum.

- Eg veit væl, at tú sum venjari ikki skalt nýta ov nógva orku upp á dómaran, men í hesum førinum fái eg ikki latið vera. Mær dámar best, tá tingini ganga rætt og erliga fyri seg, men tað kendi eg ikki, at tey gjørdu hesaferð. Vit venja hóast alt fimm ferðir um vikuna gjøgnum alt árið, men tá eg so siti við kensluni av, at hasin maðurin á miðjuni er óbrúkiligur, tá kemur eitt sindur av panikki í úti á beinkinum. Hann gevur nøkur kort, sum eg als ikki skilji. Hann kolldømir eitt mál, sum eg heldur einki skilji av, og hvussu hann kundi leggja fimm minuttir afturat hasum dystinum, skilji eg so slettis einki av, staðfestir NSÍ-venjarin.

At enda, so vildi Trygvi tó enn einaferð leggja dent á, at tað serliga var teimum sjálvum at takka, at úrtøkan ikki var betri enn tað sama.

- Nú hava vit spælt móti bæði HB og B36, og vit hava hildið teimum sera væl í verjupartinum. Tí er tað ikki nóg gott, at vit lata fýra mál fara inn hesaferð. Sjálvandi skulu teir hjá TB eisini hava rós fyri sín hugburð, men hasi fýra málini kunnu væl koma at kosta okkum nógv, staðfesti Trygvi Mortensen at enda.

**-jm**